## Neyðrakett á tekju

Beint eftir miðnátt nýggjársaftan, fekk løgreglan fráboðan um, at eitthvørt fýrverk var dottið niður á tekjuna á býlingshúsinum í Gillagøtu í Hoyvík. Vakthavandi sigur, at talan ógvuliga sannlíkt var um eina neyðrakett.

Sløkkiliðið varð eisini boðsent, og kom á staðið beinanvegin, men tá var fýrverkið slóknað av sær sjálvum, uttan at eldur var komin í ella at nakar skaði varð hendur.

Sløkkiliðið kannaði tó bygningin væl og virðiliga, og helt eyga við honum alla náttina.

## Bardagi á Manhattan

Klokkan 03.30 nýggjársnátt, var boðað frá bardaga á Manhattan. Løgreglan kom á staðið at skilja partarnar, og teir góvust beinanvegin løgreglan kom.

Vakthavandi sigur, at teir sjáldan gera nakað meiri við tílíkar bardagar, tí oftast eru partarnir líka góðir um tað.

– Tað kemur fyri, at vit koyra annan partin til hús, fyri at skilja teir sundur. Men tað er upp til innblandaðu partarnar, um teir vilja meldað hin fyri harðskap. Oftast vilja teir ikki tað, tí teir sláa sum oftast báðir, greiðir vakthavandi frá.

## Húsaófriður í Havn

Nýggjársnátt ringdi onkur inn á støðina, og bað løgregluna koma út og megla í húsaófriði. Politiið kom á staðið og fekk skilt partarnar sundur. Tað endaði við so góðum friði, at báðir partar vórðu verandi eftir.

Vakthavandi sigur, at teir annars ofta taka mannin við, og koyra hann til hús, ella til familju, um vandi er fyri, at partarnir bresta saman aftur.

## Postkassar sprongdir

2. januar komu tvær fráboðanir um, at ótangar høvdu sprongt postkassar í Hoyvík í luftina við fýrverki.

Fyrra fráboðanin kom kl. 15.30 í Guttormsgøtu á Løgmannabreyt, og seinna fráboðanin kom kl. 16.10 Millum Gilja.

Vakthavandi sigur, at teir ikki fingu fatur í ótangunum, men at tað er ógvuliga sannlíkt, at tað hava verið teir somu, eftirsum, at tað var so stutt ímillum spreingingarnar, og at tað var í sama økið.

**Eys**

*Stríð er í stýrinum fyri Listasavn Føroya um nýggja leiðaran, sum skal setast. Meiriluti í stýrinum tók á fundi í farnu viku undir við, at tann innstillaði umsøkjarin skal hava starvið, men formaðurin vil ikki viðurkenna hetta og hevur biðið Mentamálaráðið kanna førleikarnar hjá umsøkjarunum. Nú valdar stór óvissa um starvsetanina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Stríð um listamaktina

**Starvssetanin av nýggjum leiðara fyri Listasavn Føroya er blivið til ein rúkandi vígvøll í stríðnum millum listafólkini í Føroyum. Meirilutin í stýrinum fyri Listasavnið atkvøddi fyri innstillaða umsøkjaranum, men formaðurin í stýrinum er ímóti og sigur, at eingin er settur í starvið enn. Hann vil hava Mentamálaráðið at kanna, um umsøkjararnir lúka treytirnar í starvslýsingini**

LISTASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyska listalandslagið er í hesum døgum alt annað enn merkt av mjúkum litum, bláum himni, summargrønum slættum og hugtakandi sólskini. Skuldi onkur av føroysku listafólkunum nú mála hetta landslag, so hevði tað líkst meira einum myrkum vígvølli við skotgravakríggi, rúkandi byrsumúlum og listarligum spreingingum.

Tað er trupult at staðfesta, hvar hetta stríð byrjar, og hvar tað endar. Men fronturin er í løtuni Listasavn Føroya, har nýggjur leiðari skal setast.

Ein fundur í stýrinum fyri Listasavni í farnu viku skuldi seta nýggjan leiðara fyri Listasavn Føroya, og ein meiriluti í stýrinum var samdur um, at Helgi Fossadal skuldi hava starvið. Men formaðurin í stýrinum var ímóti hesum, og hann hevur biðið Mentamálaráðið kanna, um umsøkjararnir lúka treytirnar í starvslýsingini.

Nú valdar ruðuleiki, og stóri spurningurin er, um leiðarin er settur ella ikki.

### Eingin endalig loysn

Síðani Bárður Jákupsson fór frá sum leiðari fyri Listasavn Føroya, hevur tað ikki eydnast at finna eina varðandi loysn fyri leiðsluna av savninum.

1. juli í fjør varð Mathea Hilduberg sett sum leiðari fyri Listasavnið, meðan danska Inger Smærup Sørensen ein mánað seinni fór til arbeiðis sum listafrøðingur.

Stýrið fyri Listasavnið ætlaði, at leiðslubygnaðurin fyri savnið skuldi vera soleiðis, at ein leiðari var við hægstu ábyrgd av savninum í breiðari merking, og síðani skuldi ein listarligur leiðari verða, sum skuldi hava útbúgving sum listafrøðingur og hava listarligu ábyrgdina av Listasavninum.

Men hesin bygnaður er ongantíð formliga settur í verk, Mathea Hilduberg segði seg úr starvinum eftir stuttari tíð, og Inger Smærup Sørensen gjørdist fyribilsleiðari fyri Listasavnið.

Nú skuldi ein endalig so ein leiðari endaliga setast at stýra Listasavninum, men tað endaði bara við, at stríðið millum tveir ymiskar bólkar í listaumhvørvinum breyt út í ljósum loga.

### Stýrið skal seta leiðara

Tað er stýrið fyri Listasavnið, sum ger av, hvør skal verða leiðari. Fýra fólk sita í stýrinum, og tey eru vald av Mentamálaráðnum, Tórshavnar býráð, felagnum Føroysk Myndlistafólk og Listafelagi Føroya.

Umboðini í stýrinum eru Gunnar Hoydal, sum er formaður, Helgi Fossadal, Heðin Mortensen og Astri Luihn. Í sambandi við viðgerðina av nýggjum leiðara, hevur Malan Marnersdóttir verið innkallað sum eykalimur, tí Helgi Fossadal hevur søkt starvið.

Viðtøkurnar fyri Listasavnið siga, at stýrið fyri Listasavnið setir leiðara og loysir hann úr starvið. Fýra fólk sita í stýrinum, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Stendur tað á jøvnum, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi.

Tá ið leiðari skal setast fyri Listasavnið, verður hetta gjørt eftir innstilling frá tveimum føroyskum listarfeløgum – Føroysk Myndlistafólk og Listafelagi Føroya. Hesi bæði feløg hava – sambært upplýsingum hjá Sosialinum – bæði innstillað Helga Fossadal til starvið og ongan annan av hinum trimum umsøkjarunum.

### Vildu fylgja innstilling

Meirilutin í stýrinum fyri Listasavnið tók á fundinum í síðstu viku undir við tilmælunum frá listarfeløgunum, men formaðurin var ímóti, og hann vildi ikki viðurkenna avgerðina.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Gunnari Hoydal fyrrapartin í gjár, men hann hevur sagt við Útvarpið, at eingin leiðari er settur á Listasavninum. Hann sigur, at fundurin um starvsetanina var niðurlagdur, meðan tað verður kannað, um umsøkjararnir lúka treytirnar í starvslýsingini, har søkt varð eftir einum fólki, sum hevur útbúgving sum listafrøðingur ella tilsvarandi útbúgving. Hetta er Mentamálaráðið biðið um at kanna, og fundurin um nýggja leiðaran skal takast uppaftur, tá ið Mentamálaráðið er komið við einum svari, sigur formaðurin.

Sostatt tykist ruðuleiki valdað í listarliga umhvørvinum, og eingin kann við vissu siga, um nýggjur leiðari er settur fyri Listasavnið, um avgerðin hjá meirilutanum í nevndini stendur við, um Mentamálaráðið kann gera annað enn lata stýrið fyri Listasavnið taka avgerðina, ella um starvið skal lýsast av nýggjum.

### Nógvir smáir bardagar

Stríðið um leiðaran á Listasavninum er bara ein av nógvum ósemjum, sum hava verið millum tveir bólkar av listafólkum og fólkum í føroyska listaumhvørvinum seinastu tíðina.

Tað er trupult at definera bólkarnar, men ein bólkur við teimum mest etableraðu og royndu listarfólkunum eru komin í minniluta ímóti einum størri bólki av listarfólkum, sum er ein blanding av fólki, sum fáast við listarligt arbeiði burturav og framíhjá.

Tá ið aðalfundur var í felagnum Føroysk Myndlistafólk herfyri, vóru tveir av teimum etableraðu við undirlutan í atkvøðugreiðslum.

Ein nýggjur nevndarlimur skuldi veljast, og her stóð valið millum Bárð Jákupsson og Guðrið Poulsen, og Guðrið varð vald. Eisini skuldi eitt fólk veljast at umboða felagið í stýrinum fyri Listasavnið, og her varð Sigrun Niclasen, sum er eitt lutvíst nýtt navn í listaumhvørvinum, vald fram um Trónd Patursson, sum varð skotin upp av Bárði Jákupsson.

Tveir dagar seinni fekk formaðurin í Føroysk Myndalistafólk bræv, har ellivu av teimum meira royndu yrkislistarfólkunum meldaðu seg úr felagnum – millum annað Bárður Jákupsson og Tróndur Patursson. Hetta kom sum ein avleiðing av aðalfundinum, tí tey ellivu hildu, at felagið ikki longur røkti teirra áhugamál.

Nú halda fólk í listaumhvørvinum ondini, meðan bíðað verður eftir svari úr Mentamálaráðnum. Fólkini í stýrinum fyri Listasavnið vilja ikki gera viðmerkingar til støðuna, og tað tykist, sum um óvissan um leiðarastarvið er stór í løtuni.